Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 25. november 2005



**Riget I (1)**
Dr2 fer aftur undir at endursenda donsku ræðurøðina, ið amerikanarar eisini hava fingið eyguni upp fyri. Hetta sæst á Tv3-rásini fríggjakvøld, har amerikanska útgávan Kingdom Hospital, ið Stephen King hevur skrivað, er á skránni. Í 7. parti fáa frú Druse og Hook lækni eini sera órógvandi boð. Men upprunaliga, danska ræðusøgan byrjar við, at frú Drusse hoyrir barnagrát í elevatorslokuni.
**Mánadag 28. kl. 20.10**





**Jólagøtan 1 - Lív og lívið á jólagøtuni**
So byrjar jólamánaðurin! Jólakalendarin í ár er á jólagøtuni úti á Reyni. Lív, sum er vertur á sendingini, gongur hvørt kvøld ein túr í gøtuni, og har hendir nógv forvitnisligt. Framvið gøtuni eru sølubúðir við góðgæti, listahandverkið, djórum og mangt mangt annað. Lív vitjar sølubúðirnar og í teimum er altíð okkurt at frætta. Jólagøtan verður send hvørt kvøld frá 1. - 24. desember kl 18.
**Hósdag 1. kl. 18.00**

**Gangs of New York**
Stórfilmur, ið Martin Scorsese hevur leikstjórnað, um ein fátækabýling New York í 1860unum, har harkalið seta sín serliga harðrenda dám á býlingin. Amsterdam (Leonardo Di Caprio) fer uppí bandan hjá Bill the Butcher, valdsharranum í býlinginum, sum í síni tíð drap pápa Amsterdam. Ófriður, ótryggleiki og korruptión eru væl kendir partar av býarmyndini. Aktion/drama frá 2002
**Mánadag 28. kl. 20.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**